**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**

Stuðulsskipanin fyri vaksin

# Ergoterapeutur

Søkt verður eftir ergoterapeuti til Stuðulsskipanina fyri vaksin frá 1. januar 2006 til og við 31. januar 2007.

Stuðulsskipanin fyri vaksin veitir tænastu til persónar millum 18 og 67 ár, ið vegna likams- ella sinnisbrek, hava tørv á stuðli í gerandisdegnum.

Endamálið er, at viðkomandi, ið fær stuðul, skal fáa møguleikar at liva eitt so sjálvstøðugt, virkið og virðiligt lív, sum fotreytirnar hjá viðkomandi loyva.

**Arbeiðsuppgávur:**

- Meta um og lýsa førleikan hjá brúkarum og tørv á tiltøkum
- Veita ADL-venjing - bæði einstaklingum og bólkum
- Veita vegleiðing til brúkarar, starvsfólk og avvarðandi um tiltøk, ið kunnu vera við til at viðlíkahalda og menna førleikar hjá brúkarum
- Veita ergonomiska vegleiðing, undirvísing og ráðgeving til starvsfólk og avvarðandi
- Veita vegleiðing og ráðgeving um hjálpartól

**Vit sóknast eftir einum ergoterapeuti, sum:**

- Hevur hug og hegni at arbeiða tvørfakligt og samstarva við aðrar stovnar
- Hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur áræði og eina positiva menniskjafatan

**Vit kunnu bjóða:**

- Eitt starv við nógvum avbjóðingum
- Eitt starv við tvørfakligum samstarvi á einum arbeiðsplássi í støðugari menning
- Ein ágrýtnan og eldhugaðan starvsfólkahóp við góðum hugalag og umsorgan fyri hvørjum øðrum

**Setanar- og lønarviðurskifti:**

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Ergoterapeutfelagið.

Fleiri upplýsingar um starvið eru at fáa á tlf. 354020.

**Umsóknarfreist:**

6. desember 2005. Setanarsamrøður verða væntandi í viku 50.

**Umsókn** við neyðugum prógvum og viðmælum skal sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**

att: Regin Johansen
Løkjatún 1
160 Argir

# Eykaaðalfundur

## p/f Flogsamband F.F.

## í likvidatión

Kallað verður við hesum inn til eykaaðalfund *hósdagin 15. desember 2005, kl. 14.00 á Hotel Hafnia.*

Skráin er:
Framløga av grannskoðaðum avtøkuroknskapi til góðkenningar.

Eyðfinnur Jacobsen
likvidator.

**Runavíkar kommuna**

# Søkir eftir

## Avloysara fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi

Á Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur við 14 børnum í hvørjari, 3 barnagarðsstovur við 18 børnum í hvørjari og ein barnagarðsstova við 12 børnum.

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**

- hevur umsorgan fyri børnum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

Søkt verður eftir avloysara fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi, 35 t. um vikuna, til eina stovu við 14 vøggustovubørnum frá 1. januar til 30. septembur 2006.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Fríðu Lómstein, leiðara ella Conny Jacobsen, varðaleiðara á tlf. 448254 ella 218254

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 12.desembur 2005 kl. 12,00.



**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

**Einkjur og einkjumenn við ómyndigum børnum, hava aftur í ár høvi at søkja Einkjugrunn Føroya um fíggjarligan stuðul**

Umsóknarblað fæst við at venda sær til Føroya Sparikassa, Stjórnarskrivstovan, tlf. 348 000, fax 348 400 ella via teldupostadressu: stjornarskrivstovan@sparikassin.fo

Freistin at søkja er 1. desember 2005.

**Einkjugrunnur Føroya**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Landssjúkrahúsið**
FO-100 Tórshavn

# Læknaskrivari

Á **Medisinska deplinum** er eitt starv sum læknaskrivari fulla tíð leyst at søkja fyri læknaskrivara í farloyvi til setan 1. januar til og við 30. september 2006 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv:**

- útbúgving sum læknaskrivari
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

**Løn og setanartreytir** sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, leiðsluskrivara, telefon 304500, lokal 6103.

**Umsóknarfreistin** er úti 12. desember 2005 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn** í brævbjálva merktur »umsókn til starv« við CV, avrit av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
att: Una Dalsgaard
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

# Jørð á Eiði og í Miðvági

ADVOKATVIRKIÐ

Fæst hóskandi boð, selja vit matr.nr. 28a og 34a á Eiði og matr.nr. 111a í Miðvági.

**Matr nr. 28a (samanlagt við matr.nr. 34c) er:**
Uttangarðs: 4 gyllin í Suðurhelvt, matr.nr. 435
4 gyllin í Svínáhaga , matr.nr. 437b
Innangarðs: 7.767 m²

**Matr.nr. 34a (samanlagt við matr.nr. 28 b) er:**
Uttangarðs: 3 gyllin í Norðurhelvt, matr.nr. 434a
Innangarðs: 12.334 m²

**Matr.nr. 111a, Miðvágur er:**
Innangarðs: 3.038 m²

Tikið verður móti boðum upp á ognirnar hvør sær.

SKRIVSTOVUSAMSTARV
ADVOKATVIRKIÐ

Páll Nielsen, Eyðhild Skaalum
Sigmund Poulsen, Hans Trygvi Teirin

Skansavegur 1 · Postsmoga 85 · FO-110 Tórshavn
Tel 312171 · Fax 315874
e-mail: advokatvirkid@advokatvirkid.fo
ella sigmund@post.olivant.fo